


www.oljan.fo

**Jan Müller** 24 - 02 - 2012

# Funnu oljuspor á Drekaleiðini

Kanningar, sum eitt bretskt og eitt norskt felag hava gjørt, hava staðfest spor av olju á havbotninum á Drekaleiðini, sum er í landnyrðing úr Íslandi. Íslendski Orkustovnurin skrivar á sínari heimasíðu, at kanningarúrslitið gevur spennandi innlit í oljujarðfrøðina á Drekaleiðini, men at eftir er at kanna, um oljan kann brúkast, og um hon kann útvinnast. Orkustovnurin sigur, at oljusporini eru funnin í gróti frá Juratíðarskeiðinum, sum var fyri 200 til 150 milliónum árum síðani, og tey staðfesta, at eitt virkið kolvetniskervi er á Drekaleiðini. Íslendska stjórnin hevur í løtuni leitiloyvi í útboði, men freistin at søkja loyvi er úti um ein góðan mánað, so tað bretsk-norska kanningarúrslitið kemur í seinna lagi til hetta útbjóðingarumfarið. Hinvegin kann úrslitið koma oljuleitingum aðrastaðni í Evropa og í Grønlandi til góðar, skrivar Vísir.